## DAGSINS MEINING

# Tað eru Guds børn, ið batna

Í samband við at skip skrásett í Belize liggja og fiska kongafisk í Irmingarhavinum, tí teir góðkenna ikki kvoturnar hjá NEAFC, hevur Jørgen Niclassen landstýrismaður í fiskivinnumálum boðað frá, at hesi "piratfiskiskip" ikki skulu sleppa at bryggju í Føroyum.

Tað er gott, at landsstýrismaðurin tekur eina greiða støðu í hesum málinum, og skal hann hava rós fyri greiðu støðu sína. Vit kunna bara staðfesta, at tað eru Guds børn, ið batna.

Fyri á leið 10 árum síðani áttu føroyingar skip skrásett undir Belize flaggi og øðrum eksotiskum fløggum. Hesi skipini fiskaðu í loynikrókinum. Táverandi landsstýrismaður í fiskivinnumálum heitti á føroysk virki um ikki at taka ímóti fiksi frá hesum skipum. Hetta var ikki so væl móttikið av øllum føroyingum og serliga kreftir í Fólkaflokkinum dámdu hetta illa. Nú 10 ár seinni er vend komin í, og tekur Fólkaflokkurin eina skilagóða støðu. Piratfískarí eigur ikki at góðtakast, og hentleikafløgg í fiskivinnuni er ein ósiður, óansæð um tað eru føroyingar ella útlendingar, ið standa aftanfyri. Vónandi var loynikróksfískaríið tað síðsta dømi um føroyskar løtuvinningsreiðarar, ið koma dragsandi við skipum undir Belize flaggi.

Vit mugu vóna, at greiða støðan hjá Føroya Landsstýri til piratfískarí kemur at standa við – eisini um tað skuldi hent, at føroyskir reiðarar fara at finna uppá okkurt tílíkt fyri at sleppa undan altjóða avtalum og altjóða kvotum, ið Føroya Landsstýri virðir, sum vit sóu tað í loynikrókinum. Tað fer altíð at bera til hjá spekulantum at finna okkurt land onkustaðni, ið ikki viðurkennir kvotur fyri Norðuratlantshavið.

Tað skal verða okkara vón, at Jørgen Niclassen við at taka hesa støðu, eins og ein av undanmonnum hansara tók hesa støðu fyri á leið 10 árum síðani, er við til at seta endaligt punktum fyri óreguleraðum rovfiskaríi undir hentleikaflaggi her á okkara leiðum. Vit kunnu bert staðfesta enn einaferð, at tað eru Guds børn, ið batna – eisini í Fólkaflokkinum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Myrkasta løtan hjá SvF?

**Heri Simonsen**



Áðrenn tað neiliga! Ein stór tøkk til Mikkjal Helmsdal, SVF-stjóra, umframt Tórð Mikkelsen og Øssur Winthereig fyri at vísa okkum allar hesar HM-dystirnar, umframt kvøldsendingarnar við hæddarpunktunum. Hetta er eitt gott tiltak, sum sjónvarpsmanningin skal hava eina risastóra tøkk fyri. Serliga frá okkum mongu, sum enn ikki hava parabol.

Men! Tá nú manglandi signalið hjá danska TV-2 oyðilegði morgunin hjá 20.000-25.000 fótbóltsglaðum, føroyskum sjónvarpshyggjarum, og tá tað skjótt gjørdist greitt, at signalið ikki kom afturíaftur, átti ein at leita til onnur alternativ:

*1) SVF kundi lagt seg eina løtu inn á svenska TV-4, sum eisini sendi dystin, so høvdu vit í hvussu er skandinavisk frásøgufólk til dystin millum Danmark og Frakland.*
*2) Um hetta ikki varð gjørligt, átti SVF at samsent seinna hálvleik millum Senegal og Uruguvei á DR, har vit samstundis - leypandi - øll høvdu verið kunnaði um gongdina í dystinum millum Danmark og Frakland.*
*3) Aðrar fylgissveinarásir sendu Danmark-Frakland, og kanska kundi SVF "lánt myndina" frá teimum eina løtu.*
*4) Vóru hesi 3 møguleikarnir allir ómøguligir at gjøgnumføra, hevði verið møguligt at fara inn á danska P3-útvarpið á alnótini. Og lagt beinleiðis donsku fótbóltsfrásøgnina frá P3 inn á ljóðsporið samstundis, sum vit høvdu svarta skermin við standard-fráboðanini, um manglandi fylgissveinasambandið! Og hví bleiv ikki skrivað á skermin hvat støðurnar vóru í báðum dystunum?*

Á fiskivinnuøkinum hava norðmenn altíð roynst føroyingum boysnir. At so ein norskur trolari skuldi oyðileggja okkum henda søguligu norðurlendska fótbóltsmorgunin, er besta dømi um: "At bert er bróðirleyst bak!".

Annars hevði stundum ikki bilað, um Tórður og Øssur hvíldu seg í hálvleikinum, og loyvdu teimum enn meira kønu studiovertunum hjá TV-2 og DR framat í hálvleikssteðgunum. Vit virða vælmeinta innsatsin sera nógv, men tað hevði verið forfrískandi at hoyrt okkurt annað enn: "Vit fara at senda 2. hálvleik, so skjótt hann byrjar aftur!".

Annars eini góð ráð til teir sjónvarpshyggjarar, ið ikki hava parabol. Oyðileggja 4 norskir línubátar fjórðingsfinalurnar, oyðileggja 2 norskir partrolarar hálvfinalurnar, ella oyðileggur 1 stórur trolari hjá Kjell Inge Røkke HM-finaluna, so stilla útvarpstólið á 693 MW, ella 909 MW. Har hoyrist BBC-5, og teirra framúrskarandi frásøgumenn og serfrøðingar. Teir bjargaðu so okkum 7 monnum, ið sótu saman og hugdu (eftir 1. hálvleiki:) Danmark-Fraklandi frá tí ultimativu katastrofuni!

Spenningurin er stórur, um hvør gerst Heimsmeistari! Vónandi Danmark ella Svøríki. Men spenningurin um hvør fær ársins neyðrakett, er heldur lakari. Man norski trolarin ikki hava onkra umborð?

# Mango spennandi sølutiltak á Torginum í SMS



TÍÐINDASKRIV

Í hesum døgum er gávuhandilin Mango á tí nú - nakað minkaða - Torginum í SMS. Og her verður Mango ein stóran part av teimum báðum komandi mánaðunum.

Orsøkin til langa sølu-átakið hjá Mango á Torginum, er tann, at í sambandi við umbyggingina av SMS, noyðist handlin at lata aftur í august mánaða. Og tá handilin letur upp aftur í september mánaða, verður hann nakað minni enn í dag. Men viðskiftafólkini hjá Situ Rajani, sum eigur Mango, verða ikki við sviðusoð. Tí, sum Sita sjálv sigur, so fara tær í Mango komandi tveir mánaðirnar at selja serliga nógv spennandi á Torginum. Og eisini verða góð tilboð á Torginum hesar dagarnar. Undanfarnur søluframsýningarnar hjá Mango hava verið rættuliga væl vitjaðar, og Sita Rajani, sum eigur handilin, vónar, at framsýningin hesaferð ikki verður nakað undantak.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




Martin Mouritsen:

# Útinnandi tónleikurin tørv á peningi

**Martin Mouritsen, leiðari á Musikkskúlanum, sigur, at virðislønin, ið Sunleif Rasmussen hevur vunnið er ein viðurkenning, ið hevur nógv at siga. Men tað er ein veruleiki, at tann útinnandi tónleikurin hevur tørv á størri peningajáttanum fyri at teir professionellu tónleikararnir í Føroyum kunnu halda seg á einum ávísum støði**

TÓNLEIKUR
*Ingrid Bjarnastein*



*Martin Mouritsen, leiðari á Musikkskúlanum, sigur, at Sunleif Rasmusen hevur Nordisk Musikpris fult uppibornan*
*Savnsmynd*

– Nordisk Musikpris frá Norðurlandaráðnum hevur stóran týdning fyri tað, at ein gerst sjónligari á hesum økinum innan tónleik. Tað eru fá í Føroyum, sum spæla slíkan nýggjari partitur tónleik, og hetta er ein viðurkenning, ið hevur nógv at siga. Hondverkið er mett at vera gott, og ein kann róliga siga, at hetta er als ikki kvøðuljómatónleikur, sigur Martin Mouritsen, leiðari á Musikkskúlanum, um virðislønina Sunleif Rasmussen júst hevur fingið frá Norðurlandaráðnum.

Men Martin heldur, at tað er ein veruleiki, at játtanirnar til tann útinnandi tónleikin í Føroyum eru ov smáar, og tær játtanirnar, ið koma, koma ofta uttanifrá.

– Tað er tørvur á at játta pening til spæl. Um vit taka musikkskúlan sum dømi, so høvdu teir flestu av lærarunum kunna hugsað sær eina samantvinning av at undirvísa og at spæla, harav tann største parturin verður spæl, soleiðis at teir kunnu halda eitt ávíst støði, greiðir musikkskúlaleiðarin frá.

Hann sigur, at undirvísingarverðin og tann spælandi verðin skuldu verið blandaðar saman, tí tey somu fólkini, ið ganga aftur, hava brúk fyri at spæla meira enn tey undirvísa.

– Játtinin, sum hon er í dag, er ov lítil. Um vit brúka peningin vit fáa til tann útinnandi partin, ja, so verður onki eftir at undirvísa fyri. Tónleikararnir mugu hava grundarlag fyri at kunna spæla í Føroyum, sigur Martin Mouritsen.

### Fult uppiborið

Fyri at venda aftur til Sunleif Rasmussen og Nordisk Musikpris, sigur Martin Mouritsen, at hann varð ikki ovfarin av tí, at hann vann.

– Sunleif er seriøsur, hann arbeiðir við tónleiki hvønn dag. Tað hevur eisini nakað við tað at gera, hvussu ein dugir at selja seg sjálvan, og tað dugir Sunleif. Hann nýtir náttúru ella frammanundan kendan skaldskap og knýtir hesi hugtøk afturat tónleikinum. Sunleif dugir at finna tey røttu sambondini, og hann hevur eina javnvág millum tað sansaliga og strukturella.

– Tá Sunleif komponerar, so siterar hann ikki føroysk fólkaløg, men letur okkum vita, at hetta er eitt dult upprunastøði, sum hann brúkar at komponera út frá eftir seriellum og spektralum prinsippum. Ein listilærd javnvigan millum tað sansaliga og bygnaðarliga, sigur musikkskúlaleiðarin.

Martin Mouritsen sigur, at samskifti broytist, og tað vísir seg aftur í tónleikinum hjá Sunleifi. Í eini av symfoniiunum brúkar hann ein bandspælara saman við akkustiskum ljóðførum. Hetta er nakað nýtt í sær sjálvum, at brúka elektronik og akkustik saman.

– Tá er spurningurin, hvør skal rætta seg eftir hvørjum? Men í hesi symfoniini, Tid, ild, baglæns, yvirtekur elektronikkurin til síðst. Tað eru ikki bara hugtøk, og tú lurtar eftir øðrum fladum enn vanligt, greiðir Martin Mouritsen frá.

Sunleif Rasmussen vann fyrr í vikuni Nordisk Musikpris áljóðandi 350.000 danskar krónur umframt sjálvan heiðurin. Virðislønin verður handað í oktober í Helsingfors.

Føroya Løgting 150 ár:

# Serstøk frímerkjaútgáva

*Í sambandi við, at ólavsøkudag eru liðin 150 ár síðani Føroya Løgting varð endurstovnað, gevur Postverk Føroya út tvey nýggj frímerki, ið hava við løgtingið at gera. Harumframt koma fýra onnur frímerki út við myndaevnum úr føroyskari náttúru*




**Í sambandi við, at 150 ár eru liðin síðani Føroya Løgting varð endurstovnað, hevur Postverkið givið út eina serliga frímerkjaútgávu**

ÚTGÁVA
*Ingrid Bjarnastein*

Myndaevnini eru skjøl og lutir frá virkseminum hjá Føroya Løgtingi, bæði í eldri tíð og eftir, at tað varð endurstovnað í 1852.

Frímerkini koma út tann 17 juni, og tá vera eisini fýra frímerki við myndaevnum úr føroyskari náttúru útgivin. Tað er Edward Fuglø, sum hevur teknað hesi frímerki, sum ímynda fuglaegg og ungar.

Sagt verður av Postverkinum, at hesar útgávurnar fella væl í tráð við eitt av aðalmálunum, sum Postverk Føroya hevur sett sær í sambandi við frímerki: At føroysk frímerkir skulu vera ein góð og virðilig umboðan uttanlands.

Tey vøkru føroysku frímerkini taka støði í myndaevnum úr søgu føroyinga, tí serligu mentanini og tí serstøku náttúruni.

Seks nýggju frímerkini koma út 17. juni.

# 8 mánaðar fyri manndráp av ósketni

*Soleiðis sá bilurin út eftir óhappið á Lambareiði fyri góðum ári síðani. Bilførarin er dømdur átta mánaðar fongsulsrevsing fyri manndráp og likamsløst av ósketni*



**Ungi bilførarin, sum koyrdi bilin, ið fyri góðum 15 mánaðum fór útav á Lambareiði, varð dømdur í Eystara Landsrætti mikudagin**

DÓMUR
*Ingrid Bjarnastein*

15 mánaðar eru farnir síðani stóru bilvanlukkuna á Lambareiði, har tríggir ungir mans lótu lív. Bilførarin og ein ung genta yvirlivdu vanlukkuna.

Ungi maðurin, ið koyrdi bilin, varð í Føroya Rætti dømdur sjey mánaða fongsulsrevsing, men tók ikki við dóminum og kærdi hann fyri Eystara Landsrætt. Men har var ongin hjálp at heinta, tí dómurin ungi maðurin fekk frá Eystara Landsrætti var strangari enn dómurin frá Føroya Rætti, tí hesuferð varð hann dømdur átta mánaðar handan rimar. Hann er dømdur fyri manndráp og likamsløst av ósketni. Harafturat hevur ungi maðurin mist koyrikortið í fimm ár.

Bilførarin, ið onki sigur seg minnast frá hendingini, játtaði seg ikki sekan og kravdi frídøming.